# Farloyvisstarv sum samskipari/skrivari

**fyri tíðarskeiðið 1. august 2008 og eitt ár fram.**

**Eitt starv, farloyvisstarv, sum samskipari/skrivari í Almanna- og heilsumálaráðnum er leyst at søkja til setan 1. august 2008, ella eftir nærri avtalu.**



### Um starvið

Talan er um eitt starv á heilsupolitisku deildini, har tú kemur at verða við til at fyrireika mál og lættari málsviðgerð, at vera skrivari á ymsum fundum og aðrar fyrifallandi skrivarauppgávur. At luttaka í verkætlanararbeiðinum at fáa nýggja pappírleysa journalskipan til ráðið. Saman við deildarstjóra at samskipa býtið av málum á deildini, og skrásetа samsvarandi hesum.

Starvið er áhugavert og mennandi við skiftandi og fjølbroyttum uppgávum, sum skulu loysast í samstarvi við deildarstjóra og hini starvsfólkini á deildini. Starvið er sjálvstøðugt, og góðir møguleikar eru fyri skeiðum og framhaldandi førleikamenning.

### Førleikakrøv

Viðkomandi útbúgving. Starvsroyndir frá miðfyrisitingini er ein fyrimunur.
Harumframt vænta vit, at tú hevur góð samstarvsevni og góð evni at orða teg greitt í skrift og í talu, og dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

### Lønar- og setanartreytir

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið ella Búskapar-og Løgfrøðingafelagið og Fíggjarmálaráðið samsvarandi útbúgving. Viðmerkjast skal, at setanin fevnir um Almanna- og heilsumálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

Umsókn við avriti av prógvum o.ø. skulu sendast til:
Almanna- og heilsumálaráðið,
Eirargarður 2,
FO-100 Tórshavn.

### Nærri upplýsingar

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Turid Arge, deildarstjóra, telefon 30 40 50, ella teldupost: turid@ahr.fo.

### Umsóknarfreist

Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 4. juli 2008, kl. 12:00.

KREA

Almanna- og heilsumálaráðið, ið umsitur almannamál, heilsumál og bústaðarmál, veitir landsstýrinum ráð, tryggjar haldgott grundarlag og ger hugskot til veruleika. Í løtuni starvast 32 fólk í ráðnum.

*Vit draga eina línu - Vit seta skynsemi í hásæti - Vit vilja vita - Vit bróta slóð*

**ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ**

Eirargarður 2 . FO-100 Tórshavn
Tel 30 40 50 . Faks 35 40 45 . ahr@ahr.fo . www.ahr.fo

# Fulltrúi til Almanna- og heilsumálaráðið

**Eitt starv sum fulltrúi í Almanna- og heilsumálaráðnum er leyst at søkja til setan 1. august 2008, ella eftir nærri avtalu.**



### Um starvið

Talan er um eitt starv á heilsupolitisku deildini, har tú kemur at ansa eftir, og hava umsjón við útreiðslunum til serviðgerð uttanlands og at ráðgeva um fíggjarviðurskifti og onnur fyrisitingarlig viðurskifti í hesum sambandi. Harumframt kemur tú at vera við til at gera konsekvensútrokningar av lógum og øðrum fyriskipanum innan Almanna- og heilsumálaráðið.

Serviðgerð uttanlands eru tær útreiðslur, sum landið hevur í sambandi við, at sjúklingar verða sendir av landinum til viðgerðar, í flestu førum niður til Danmarkar á Ríkissjúkrahúsið.

Starvið er áhugavert og mennandi við skiftandi og fjølbroyttum uppgávum, sum skulu loysast í samstarvi við hini starvsfólkini á deildini. Starvið er sjálvstøðugt, og góðir møguleikar eru fyri skeiðum og framhaldandi førleikamenning.

### Førleikakrøv

Viðkomandi búskaparfrøðilig, ella samfelagsfrøðilig útbúgving frá hægri lærustovni, ella drúgvar royndir frá almennari umsiting. Góðan teldukunnleika, umframt royndir, hug og evni at arbeiða við útrokningum og hagtølum.
Starvsroyndir frá miðfyrisitingini er ein fyrimunur.
Harumframt vænta vit, at tú hevur góð samstarvsevni og evni at orða teg greitt í skrift og talu, og dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

### Lønar- og setanartreytir

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið ella starvsmannafelagið samsvarandi royndum. Viðmerkjast skal, at setanin fevnir um Almanna- og heilsumálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð. Tann sum settur verður, má kunna tola møguligar broytingar í starvsinnihaldinum og starvsstaðnum.

Umsókn við avriti av prógvum o.ø. skal sendast til:
Almanna- og heilsumálaráðið,
Eirargarður 2,
FO-100 Tórshavn.

### Nærri upplýsingar

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Turid Arge, deildarstjóra, telefon 30 40 50, ella teldupost: turid@ahr.fo.

### Umsóknarfreist

Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 4. juli 2008, kl. 12:00.

KREA

Almanna- og heilsumálaráðið, ið umsitur almannamál, heilsumál og bústaðarmál, veitir landsstýrinum ráð, tryggjar haldgott grundarlag og ger hugskot til veruleika. Í løtuni starvast 32 fólk í ráðnum.

*Vit draga eina línu - Vit seta skynsemi í hásæti - Vit vilja vita - Vit bróta slóð*

**ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ**

Eirargarður 2 . FO-100 Tórshavn
Tel 30 40 50 . Faks 35 40 45 . ahr@ahr.fo . www.ahr.fo